## Russi vil hava Arsenal

Russiski ríkmaðurin Alisher Ushmanov er væl ávegis til at keypa sær meirilutan í enska Arsenal. Arsenal er helst seinasta stórfelagið í Onglandi, sum enn ikki hevur skift eigara seinnu árini, men tann støðan stendur neyvan við leingi, um Ushmanov fær sín vilja. Saman við Farhad Moshiri hevur Ushmanov nú tryggjað sær ræðisrættin á 21% av partabrøvunum í felagnum. Størsti partaeigarin er tó enn Danny Fizman, sum eigur 24% av partabrøvunum.



## Champions League verður broytt

Frá kappingarárinum 2009/2010 verður skipanin í Champions League broytt nakað. Nýggi UEFA-forsetin, Michel Platini, hevur støðugt talað fyri, at rúm skal verða fyri fleiri meistarum í kappingini, sum soleiðis ikki bert skal fevna um fremstu liðini í stóru kappingunum. Og líkt er nú til, at ein semja er gjørd. Talan verður framvegis um undankappingardystir fyri fleiri meistarar, men eitt nú verður nýggja skipanin til fyrimunar fyri donsku meistaraliðini, sum ikki renna seg í heilt so sterk lið, sum tey áður hava gjørt. Eitt nú tapti FCK hesa ferð fyri portugisiska Benfica í sínum undankappingardysti.

# Runnu móti veðrinum

**Fleiri enn 500 fólk tóku lut, tá stóra fólkaheilsurenningin varð runnin seinasta vikuskifti**

RENNING

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*
*Myndir: Edith Johannesen*

558 nøvn taldi luttakaralistin, tá árliga fólkaheilsurenningin varð skotin ígongd leygardagin. Runnið varð samstundis á fleiri støðum kring landið. Nevnliga í Vágum, Klaksvík, Eysturoynni, Tvøroyri og í Havn. At veðrið var heldur ófantaligt fekk kanska summi at setast aftur. Men hóast regn og vind, so vóru tó 558 børn, ung og vaksin, sum vunnu á veðrinum.



*Talan var um breitt tiltak, sum fevndi um allar aldursbólkar*




*Umframt at luttakararnir fingu møguleikan at røra seg nakað, kundi blóðtrýstmátingar eisini gerast. Og tað vóru tað fleiri, sum nýttu høvið til*



*Hóast tiltakið verður kallað renning, so var einki krav um, at rennast skuldi allan vegin. At ganga bar eins væl til*



*Tá rennast skal, er einki sum eitur vánaligt veður. Tað ræður um at læta seg í eftir umstøðunum*